Kappingareftirlitið
FAROESE COMPETITION AUTHORITY

Hansen & Thomassen Advokatfirma
Postsmoga 106
110 Tórshavn

**Att.: Djóni Thomassen, adv.**

**Tórshavn 27. januar 2011**

Journal nr.: 11/00006-5
Viðgjørt: S.R.

# Avgerð viðv.: Sp/f Hald yvirtekur Sp/f Johannes Andreasen

## 1. Samandráttur

Djóni Thomassen, adv. hevur við gildi frá 5. januar 2011 fráboðað eina yvirtøku av fastognum, rakstrargøgnum og vørugoymslu hjá Sp/f Jóhannes Andreasen.

Yvirtøkan verður framd við, at Sp/f Hald stovnar dótturfelag, sum yvirtekur bygningar, rakstrargøgn og vørugoymslu. Sostatt er talan um yvirtøku av handilsvirkseminum hjá Sp/f Johannes Andreasen.

Fráboðarin hevur gjørt meting, sum vísir, at matvøruhandlar hjá Sp/f Hald koma at sita á x% av viðkomandi marknaði, um yvirtøkan verður góðkend. Kappingareftirlitið metir, at leisturin, sum fráboðari hevur nýtt, er eftirfarandi og hevur tí valt ikki at innheinta upplýsingar um marknaðin í fyrstu syftu.

Í avtaluni sum fráboðari hevur sent Kappingareftirlitinum, er áseting, sum forðar fyrrverandi eigara og gamla felagnum at reka virksemi, sum er í kapping við yvirtikna virksemið næstu 3 árini. Kappingareftirlitið hevur yvirfyri fráboðara víst á venjuna hjá Kappingarráðnum á økinum. Fráboðari er eftirfylgjandi komin við eini tilsøgn, har kappingarásetingin verður avmarkað til 2 ár. Fráboðarin vísir á, at av tí at goodwill er partur av avtaluni, er neyðugt at tryggja Sp/f Hald ímóti, at seljarin tekur upp virksemi í kapping.

Kappingareftirlitið metir ikki, at tað eru viðurskifti viðvíkjandi hesi yvirtøku, sum geva høvi til at halda, at henda yvirtøkan kann hindra kappingini á viðkomandi marknaði.

## 2. Avgerð

Boðað verður frá , at yvirtøkan hjá Sp/f Hald av bygningum, tilhoyri og vørugoymslu hjá Sp/f Johannes Andreasen verður góðkend við teirri treyt, at kappingarásetingin í § 9 verður broytt frá 3 árum til 2 ár, og at nýtt eintak av avtaluni verður sent til Kappingareftirlitið í seinasta lagi 1 viku eftir góðkenning.

Kappingareftirlitið
FAROESE COMPETITION AUTHORITY

# 3. Inngangur

Djóni Thomassen, adv. hevur við gildi frá 5. januar 2011 fráboðað eina yvirtøku av fastognum, rakstrargøgnum og vørugoymslu hjá Sp/f Jóhannes Andreasen.

Yvirtøkan fer fram við, at Sp/f Hald (keyparin) stovnar dótturfelag, sum síðan keypir bygningar, rakstrargøgn og vørugoymslu frá Sp/f Johannes Andreasen (seljarin). Sethús og leigusáttmáli av sethúsunum er eisini partur av handlinum. Kappingareftirlitið metir tó ikki, at hesi viðurskifti eru viðkomandi fyri kappingina á viðkomandi marknaði, og verða hesi viðurskifti tí ikki viðgjørd í hesum tilmæli.

Avtalan millum Sp/f Hald og Sp/f Jóhannes Andreasen um yvirtøku er treytað av góðkenning frá Kappingarráðnum.

Sambært teimum upplýsingum sum Kappingareftirlitið hevur móttikið frá fráboðara, hava minst tvær av luttakandi fyritøkunum ein umsetning, sum liggur omanfyri 4 mió. kr. og samlaði umsetningurin er omanfyri 75. mió. kr.

Fráboðanin skal tí fráboðast sambært §14, stk. 2, nr. 3 í kappingarlógini og skal leggjast fyri Kappingarráðið.

## *3.1. Luttakandi fyritøkur*

***Seljarin***

Sp/f Johannes Andreasen rekur matvøruhandil í vesturbýnum í Tórshavn. Sp/f Johannes Andreasen er limur í Samkeyp, ið er ein sameining av matvøruhandlum og PH Heilsølu. Samkeyphandlarnir hava somu tilboð og hava í felag tilboðsblaðið Samkeyp.

Talva 1: Lykatøl úr roknskapinum (2009/10-2007/08)

| Sp/f Johannes Andreasen | 2009/10 | 2008/09 | 2007/08 |
|---|---|---|---|
| Bruttovinningur | 2.520 | 2.461 | 2.458 |
| Ársúrslit | 513 | 325 | 233 |
| Ogn tilsamans | 2.886 | 2.718 | 3.302 |
| Eginpeningur | 1.135 | 1.023 | 347 |

***Keyparin***

Sp/f Hald er felag, sum eigur í matvøruhandlum og eigur fastognir hjá nøkrum av hesum matvøruhandlum. Felagið eigur allan partapeningin í Sp/f INN – Tórshavn, Sp/f Netto – Klaksvík, Sp/f INN – Norðskála. Felagið eigur helmingin av partapeninginum í Sp/f Svøðan og Sp/f Katla.

Mynd 1: Bygnaðaryvirlit yvir Sp/f Hald samtakið




Niðanfyri eru talvur við lyklatølum frá ársroknskapinum fyri INN-Tórshavn og Sp/f Svøðan, sum hava virksemi á sama marknaði sum Sp/f Johannes Andreasen.

| Inn-Tórshavn Sp/f | 2009 | 2008 | 2007 |
|---|---|---|---|
| Bruttovinningur | 2.273 | 2.027 | 3.151 |
| Ársúrslit | -83 | 105 | 436 |
| Ogn tilsamans | 4.275 | 4.095 | 3.689 |
| Eginpeningur | 559 | 642 | 537 |

| Sp/f Svøðan | 2009 | 2008 | 2007 |
|---|---|---|---|
| Bruttovinningur | 2.641 | 880 | 0 |
| Ársúrslit | -83 | -843 | 0 |
| Ogn tilsamans | 7.334 | 5.876 | 2.459 |
| Eginpeningur | -807 | -723 | 120 |

## 3.2. Avtalan

Partarnir hava avtalað, at felagið, sum Sp/f Hald stovnar, keypir handilsbygningin hjá Sp/f Jóhannes Andreasen fyri x mió. kr. og tilhoyrið til bygningin fyri x mió. kr. Sethúsini verða seld fyri x mió. kr. og man hetta vera áleið marknaðarprís. Vørugoymslan verður seld til kostnaðarvirðið, eftir at partarnir í felag hava talt hana upp.

Sambært § 9 í avtaluni binda Sp/f Johannes Andreasen og stjóri felagsins seg í trý ár frá yvirtøkudegnum ikki at reka virksemi, sum kappast ella kann kappast við tann kolonialhandil, ið hevur verið rikin í handilsbygninginum tey seinastu árini. Avtalan er treytað av góðkenning frá Kappingarráðnum.

Tann 6. januar 2011 kunnaði Kappingareftirlitið fráboðara um, at Kappingarráðið higartil hevur havt ta venju, at kappingarásetingar í útgangsstøðinum ikki vóru loyvdar, men um goodwill var partur av avtaluni kundi kappingaráseting á 2 ár góðtakast, og var bæði goodwill og know-how, kundi kappingaráseting á 3 ár góðtakast.

Við tað, at 3 ára kappingaráseting var í sáttmálanum, men tað annars í fráboðanini ikki var greitt, at goodwill og/ella know-how var partur av handlinum, varð mælt til at strika ásetingina ella skjalfesta, hví tað undantaksvís var neyðugt hjá Kappingarráðnum at góðtaka hesa kappingaráseting.

Fráboðari hevur tann 19. januar 2011 kunnað um, at kappingarásetingin verður stytt til 2 ár við teirri grundgeving, at goodwill er partur av handlinum.

Fráboðarin vísir á, at kappingarásetingin er neyðug fyri at tryggja keyparanum tann kundaskara, sum higartil hevur keypt hjá Sp/f Johannes Andreasen. Sagt verður, at tað er avgerandi fyri keyparan, at Sp/f Jóhannes Andreasen og/ella stjórin Per Andreasen ikki byrjar ein kolonialhandil í grannalagnum fyrstu 2 – 3 árini, soleiðis at keyparin fær stundir til at fóta sær við nýggja kolonialhandlinum.

Sum stuðul fyri, at talan er um goodwill, vísir fráboðari eisini á, at um ikki talan var um eina samlaða sølu av virkseminum, har keyparin helt fram við kolonialhandlinum, høvdu handilsbygningurin og sethúsini verið seld fyri ein munandi lægri keypspening.

Fráboðari vísir á, at kappingarásetingin er rættuliga avmarkað bæði í mun til vinnugrein og landafrøðiliga við tað, at talan skal verða um virksemi, sum beinleiðis er í kapping við júst henda handilin úti í vesturbýnum.

## 3.4. Viðkomandi marknaður

Sambært § 5, stk. 1 skal eftirspurningsvaraseting og útboðsvaraseting nýtast, tá viðkomandi marknaður verður skilmarkaður. Við eftirspurningsvarseting verður hugt at, hvørjar vørur brúkarin metir kunnu koma ístaðin orsakað av eginleika, prísi ella nýtsluendamáli. Við útboðsvaraseting verður hugt at, hvørjir útbjóðarar innan eitt stutt tíðarbil kunnu koma inn á viðkomandi marknað. Viðkomandi landafrøðiligi marknaðurin er eitt øki, har luttakandi fyritøkurnar selja ella eftirspyrja vørur og tænastur, sum hava so mikið eins kappingarumstøður, og sum kunnu skiljast frá grannaøkjum av tí, at kappingarumstøðurnar har eru munandi øðrvísi.

Fráboðari metir, at viðkomandi vørumarknaður er matvøru til húsarhald og landafrøðiliga skilmarkingin er Tórshavnar kommuna.
Fráboðari metir, at teir størstu kappingarneytarnir á hesum marknaði eru:

1. Miklagarður
2. Bónus
3. Føroya Keypssamtøka
4. PE
5. Mylnan

Sum tað framgongur, eru tríggir av størstu kappingarneytunum Miklagarður, Bónus og FK, væl størri enn handlarnir hjá Sp/f Hald, og hesir innflyta í stóran mun sínar vørur uttan um heilsøluliðið. Miklagarður, Bónus og Mylnan eru í somu samtøku.

Fráboðari hevur mett samlaða marknaðarpartin á viðkomandi marknaði til at vera:

| | |
|---|---|
| Sp/f Johannes Andreasen | x % |
| Sp/f INN Tórshavn | x % |
| Sp/f Svøðan | x % |
| Tilsamans | x % |

Leisturin, ið fráboðari hevur nýtt, er grundaður á eina miðalnýstlu fyri hvønn persón á 1.500 kr. ella 18.000 kr. árliga. Á viðkomandi marknaði eru uml. 20.000 brúkarar, og gevur hetta tí ein marknað áljóðandi 360 mió. kr. Virðið á hesum marknaði verður síðan sett í mun til umsetningin hjá Sp/f Johannes Andreasen, Sp/f Inn og Sp/f Svøðan, tí hesi hava virksemi á viðkomandi marknaði.

## 4. Meting

Kappingareftirlitið metir, at leisturin, sum fráboðari hevur nýtt, er eftirfarandi og hevur tí valt ikki at innheinta upplýsingar um marknaðin í fyrstu syftu.

Viðvíkjandi skilmarkingini av viðkomandi marknaði metir Kappingareftirlitið, at avmarkingin av viðkomandi vørumarknaði til kolonialvørur er nøktandi, og at viðkomandi landafrøðiligi marknaður sum er Tórshavn, somuleiðis er nøktandi. Tó skal viðmerkjast, at tað uttan iva er so, at rættuliga nógv fólk uttanfyri Tórshavn, sum arbeiða í Tórshavn, keypa matvørur í Tórshavn. Í so máta kundi viðkomandi landafrøðiligi marknaður verið víðkaður nakað. Hinvegin er tað neyvan vanligt, at fólk búsitandi í Tórshavn fara út um býin fyri at keypa kolonialvørur. Kappingareftirlitið metir tí, at skilmarkingin av viðkomandi marknaði er nøktandi.

Sambært marknaðarupplýsingunum frá fráboðara fara matvøruhandlarnir í Tórshavn at hava ein marknaðarpart uppá x%. At samtakið eftir yvirtøkuna fær ein marknaðarpart uppá x%, kann í sær sjálvum ikki vera orsøk til, at kappingin verður hindrað.

Verður hugt at, hvørjir kappingarneytar eru á marknaðinum, er tað ósannlíkt, at matvøruhandlarnir hjá Sp/f Hald hava stórvegis av marknaðarvaldi. Samtøkan av Miklagarði, Bónus og Mylnu handlum og Føroya Keypsamtøku eru teir, sum mugu metast at hava marknaðarvald.

Kappingareftirlitið metir ikki, at tað eru viðurskifti viðvíkjandi hesi yvirtøku, sum geva høvi til at halda, at henda yvirtøkan kann hindra kappingini á viðkomandi marknaði.

Viðvíkjandi kappingarásetingini í § 9 í avtaluni hevur Kappingareftirlitið kunnað fráboðara um venjuna hjá Kappingarráðnum á økinum. Fráboðari hevur valt at broyta kappingarásetingina frá 3 til 2 ár og hevur latið Kappingareftirlitinum frágreiðing um, hví fráboðari metir, at goodwill er partur av avtaluni.

Kappingareftirlitið
FAROESE COMPETITION AUTHORITY

## 5. Niðurstøða

Boðað verður frá , at yvirtøkan hjá Sp/f Hald av bygningum, tilhoyri og vørugoymslu hjá Sp/f Johannes Andreasen verður góðkend við teirri treyt, at kappingarásetingin í § 9 verður broytt frá 3 árum til 2 ár, og at nýtt eintak av avtaluni verður sent til Kappingareftirlitið í seinasta lagi 1 viku eftir góðkenning.

**Kæruvegleiðing**
Avgerðir tiknar av Kappingarráðnum eftir m.a. §§ 14 og 15 í kappingarlógini kunnu kærast til:

Vinnukærunevndina
c/o Føroya Kærustovnur
Undir Hornabakka
Postsmoga 45
FO-110 Tórshavn

Kærufreistin er 4 vikur eftir móttøku av hesum skrivi.

Vegna Kappingarráðið

Ingunn Ó. Eiriksdóttir
forkvinna

Terje Sigurðsson
deildarstjóri